## Kvinnurnar ynskja eitt valdømi

Kvinnusamskipan Føroya heitir á løgtingið, um at taka undir við uppskotinum um at skipa Føroya sum eitt valdømi. Hetta var samtykt við stórum meiriluta á ársfundi hjá Kvinnusamskipan Føroya, sum var hildin á Toftum leygardagin. Vallógin má broytast soleiðis, at Føroyar verða skipaðar sum eitt valdømi, sigur Kvinnusamskipan Føroyar í tíðindaskrivi, sum Kvinnufelagssamskipan Føroya, Kongshavnar Kvinnufelag, Tofta Kvinnufelag, Kvinnufelagið í Havn og Skála Kvinnufelag standa sum avsendarar fyri.

## Urguleikarar stuðlar MLF

Urguleikarafelagið heitir á Føroya Løgting um at fáa aftur í lag skipanina við ferðapeningi til musikkskúlalærararnar. – Tað hevur sera stóran týdning, at næmingar um alt landið fáa frálæru í tónleiki. Hetta er partur av bygdamenningini og átti at verið ein sjálvfylgja, sigur Urguleikarafelagið í áheitan senda fjølmiðlunum.

# raðfestast høgt



*Tríggjar teirra, sum arbeiða við ferðavinnu í Nólsoy. Jana Holm, Sonja Heritsdóttir, sum verður dagligur leiðari á kunningarstovuni saman við Nicolaj Falk, og Guðrun Hansen*



*Jóannes Jensen, stjóri á Hotel Føroyum, prátar við borgarstjóran, Heðin Mortensen, inni á nýggju kunningarstovuni*

húsunum og tað, tey goyma – ikki minst varaborgarstjórin, Jógvan Arge.

### Petersens Pakkhús

Síðani var stundin komin at vitja sjálva kunningarstovuna, sum heldur til í einum gomlum pakkhúsum, Petersens Pakkhúsi, sum tað eitur millum manna.

Pakkhúsið er bygt í 1787, upprunaliga at turka fisk í, men seinni varð tað umbygt soleiðis, at tað kundi húsa fyrsta handli, sum menn vita um í Nólsoy. Petersen sjálvur hevði eisini handil, men hesin var í hansara egnu sethúsum, sum í dag eru friðað. Parið, ið fer at standa fyri kunningarstovuni, hava umvælt húsini hjá Petersen í gomlum stíli og búgva har í dag.

Upprunaliga var tað ikki fyri at rúma kunningarstovu, at Eirikur Sundar Hansen byrjaði at ganga á gamla eigaran av Petersens Pakkhúsi fyri at fáa hann at selja sær bygningin. Eirik er vorðin svágur Ova Joensen, sála, og tað var fyri at tryggja bátinum, Dianu Victoriu, trygt og násligt høli, at Eirikur keypti pakkhúsið.

Men síðani kom hann við í tann arbeiðs- og áhugabólkin, sum Tórshavnar Kommuna eftir áheitan frá Kristin Holm, sála, fekk sett á stovn. Harfrá mentist tankin um, at gera Petersens Pakkhús til kunningarstovu.

Í dag virkar pakkhúsið so sum »museum« fyri bátinum hjá Ova í kjallaranum og sum kunningarstova á miðhæddini. Á loftinum verður so køkur og toilett.

Tað má sigast, at áhugabólkurin hevur verið ógvuliga ágrýtin og hevur lagt ótrúligar kreftir í, ógvuliga væl stuðlað av einari eldhugaðari Randi Fredriksberg, vinnuráðgeva hjá Tórshavnar Kommunu. Í góðum samstarvi hava tey bygt alt hetta upp, og drúgva fyrireikingararbeiðið merkir vónandi, at móttøkan á kunningarstøðini í Nólsoy í gjár bara er byrjanin til stóru ætlanina um Nólsoy, sum eina ferðavinnuoyggj.

## Fleiri tilboð á skránni

**Umframt gomlu Brunnahúsini og onnur áhugaverd støð, eru nakrir gongutúrar á skránni hjá nýggju kunningarstovuni**

FERÐAVINNA
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Ætlanin hjá ferðavinnuáhugaðum í Nólsoy er meiri og annað enn bert at veita ferðandi ein kaffimunn og tak yvir høvdið, meðan tey bíða eftir Rituni. Umframt áhugaverdu støðini í bygdini, Brunnhúsini og heimavirkissølu, eru fyribils tríggir gongutúrar á skránni.

Longsti túrurin er sum vera mann túrurin út á Borðuna, sum tekur minst tríggjar tímar. Men hetta er eisini ein áhugaverdur túrur, har tú sært heimsins einaferð størsta vita. Á túrinum er eisini vakurt útsýni yvir Havnina, Glyvursnes, Kirkjubøreyn og til deils Sandoynna.

Aðrir túrar eru eisini. Ein er niðan í Skip, sum tað verður kallað. Har er eins og ein verjubakki upp fyri, og sagt verður, at nólsoyingar flýddu niðan har at krógva seg, tá sjórænaraskip nærkaðust. Tað er eisini harfrá, at nólsoyingar á sinni rullaðu grót eftir sjórænarum, sum høvdu elt teir, við tí úrsliti, at sjórænararnir hildu undan – ein misti enntá byrsuna, sum tann dag í dag er í varðveitslu í Nólsoy.

Triði túrurin er tann lættasti og gongur niðan á Flaggstongina, sum er norðan og eystanvert bygdina. Hetta sigst vera fyrsti vitin, ið bygdur er í Føroyum, og er ein rundingur, laðaður upp av gróti, áleið tríggjar metrar høgur. Omaná var ein flaggstong sett við flaggi, sum skip so kundu meta seg eftir, tá tey komu uttan av havi eystanífrá.

Toftirnar í Korndali, sonevndu prinsessutoftirnar, eru eisini partur av skránni, og seinni er so ætlanin at víðka tilboðini við øðrum túrum. Vælumtóktu drunnhvítatúrarnir hjá Jens Kjeld Jensen eru sjálvandi eisini partur av skránni.